Bjørt Samuelsen
Sirið Stenberg
Kristina Háfoss
Gunvør Balle
Páll á Reynatúgvu
Høgni Hoydal
løgtingsmenn

Løgtingsmál nr. 90/2013: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2014

**Uppskot**
**til**
**eykajáttanarløgtingslóg**
**fyri mars 2014**

## § 20 Inntøkur

## C. Átekning

**Høvuðskonta 52.1.28. Gjald til barsilsskipan**
Avlopið av gjaldinum, aftaná at útgjaldið og útreiðslur til umsiting eru drigin frá, verður flutt til seinni fíggjarár.

## Viðmerkingar

### Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Seinastu 8 árini hevur landið tikið 64,4 milliónir krónur ov nógv inn í barsilsgjaldi, sum er oman fyri 8 milliónir krónur í miðal ov nógv kravt inn árliga. Uppskotið verður sett fram fyri at tryggja, at yvirskot í barsilsskipanini kann flytast fram til komandi ár, so pengarnir eru tøkir til at fíggja broytingar í barsilsskipanini. Eisini eigur at bera til at nýta yvirskot okkurt árið, til at fíggja møgulig undirskot onnur ár.

Tá slíkt gjald verður tikið inn frá øllum skattgjaldarum og arbeiðsgevarum til eina ávísa skipan, skulu hesir pengar sjálvandi nýtast til hetta, og einki annað. So er ikki. Seinastu mongu árini eru oman fyri 64 milliónir krónur av barsilsgjaldinum farnar í "strórapott" og nýttar til heilt onnur endamál enn barsilsskipan.

Løgtingsgrannskoðararnir átala eisini, at bara fyri tey trý árini 2010-2012 hevur yvirskotið í skipanini verið nærum 30 milliónir krónur, sum ikki verða nýttar til endamálið.

Upprunaliga var barsilsskipanin ein almenn skipan, sum varð fíggjað úr landskassanum. Í 2004 varð lógin broytt, og skipanin løgd út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at fíggja, tó bert partvíst. Tað var í 2006, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum av álvara tóku við fullu gjaldsábyrgdini av barsilsskipanini, við at inngjaldið varð sett til 0,62 %, sum bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar gjalda av øllum lønum. Bert tað eina árið síðani - í 2009 - hevur hall verið í skipanini. Hetta førdi beinanvegin til, at landsstýrismaðurin vildi hækka gjaldið, og í 2010 varð tað sett til 0,65% (Løgtingið avgjørdi tó, at hetta bert skuldi vera í eitt ár). Úrslitið varð, at yvirskotið gjørdist heili 17,1 mió. kr. í 2011.

Júst tí, at stórt yvirskot var í skipanini, valdi CHE-samgongan í 2008 alt fyri eitt at leingja barsilsskipanina við 8 vikum, umframt at styrkja rættindini hjá pápanum til barsilskvotu, og gera hesa eitt vet meira smidliga. Hetta varð gjørt við tí greiða máli, at lønta barsilsfar-loyvistíðin yvir fá ár skuldi leingjast upp í eitt ár. Allir flokkar stuðlaðu hesum.

Síðani hevur eitt yvirskot aftur støðugt bygt seg upp. Tíverri er ein orsøk til stóra yvirskotið, at færri børn verða fødd. Fyri 20 árunum síðani vórðu nærri 950 børn fødd um árið (943 í 1990), ímeðan talið av føddum børnum støðugt hevur verið minkandi, og liggur nú um 600. (576 í 2011; 619 í 2012).

Tjóðveldi hevur tvær reisur roynt at fingið undirtøku fyri at leingja barnsburðarfarloyvið við 8 vikum afturat, og gera skipanina munandi meira smidliga (Løgtingsmál 49/2012 og 20/2013). Undirtøka hevur ikki verið fyri hesum, men í skrivandi stund er landsstýrismaðurin ávegis við einum uppskoti um at leingja barsilsfarloyvið við nøkrum vikum.

C-átekningin skal tryggja, at pengar, sum verða kravdir inn frá landsins borgarum til eina samhaldsfasta barsilsskipan, einans verða nýttir til júst hetta endamálið.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**
Ásetingin ger, at ikki longur verður møguligt, at avlopið av inngjaldinum, aftaná útgjald og útreiðslur til umsiting verða drigin frá, kann nýtast til onnur endamál, enn ásett er í lóg um barsilsskipan.

**Løgtingið, tann 4. mars 2014**

Bjørt Samuelsen | Sirið Stenberg | Kristina Háfoss

Gunvør Balle | Páll á Reynatúgvu | Høgni Hoydal